# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## 50 ár síðan fyrsta flokk



*Luttakararnir sum savnaðust 50 ár eftir at tey fóru í fyrsta flokk: Helga Jacobsen, Hedvig Poulsen, Eleina Mikkelsen, Maria á Dul (Gregersen), Magdalena Næs, Aivi í Pætursastovu (Hansen), Eyðbjørg Nilsson (Olsen), Katrin Sørensen, Ása Bech (Hansen), Marita H. Arge, Brynhild Mohr, Carita Bjørklund, Elsa Mortensen (Bærentsen), Beinta í Jákupsstovu, Elin Ólavsdóttir, Gunnleyg M. Arge, Birgit Arge, Kaja Johannesen (Hammer), Tove Bech, Annlis Simonsen, Petra Erlingsdóttir (Hansen), Eydna Hansen, Sólvá Michelsen, Robert Vilhelmsen, Torkil Kjærbæk, Eirikur Ó. Simonsen, Jógvan í Dávastovu, Eyðun Ellendersen, Dánjal Norðfoss, Høgni Højgaard, Jógvan Waagstein, Leif Due Sørensen, Lutherus Hansen, Kemm Poulsen, Jakob Feilberg, Gunnar Rubeksen, Ellindur Danielsen, Óli Lindenskov, Mikkjal Dánjalson, Heðin Klein, Høgni Reinert, Johan Egholm og Eileen Simonsen. Esther undir Varða vantar á myndini*

Leygardagin 23. mai 2009 høvdu nakrir gamlir floksfelagar sett hvørjum øðrum stevnu.

Talan var um tey, sum í 1958 fóru í fyrsta flokk í Nonnuskúlanum í Havn, og nøkur sum seinni komu at ganga saman við hesum. Hetta var fyrstu ferð síðan farið varð úr skúlanum, at hesi fólk savnaðust aftur.

Meira enn 80 næmingar byrjaðu í 1958 í 1 a og 1 b, so tað skuldi stórt leitingararbeiði til at finna hesi aftur. Tað eydnaðist at samla 43 av teimum leygardagin.

Onkur komu langvegis frá, tann sum hevði ferðast longst kom úr Canada, annars komu fólk úr Norra, Danmark, Íslandi og úr øllum Føroyum.

Gomlu næmingarnir vóru saman meginpartin av leygardegnum. Fyrst í skúlanum, har leitað var aftur á gamlar slóðir og minni vóru vakt, síðan í Mariukirkjuni, har framsýning var av lutum frá skúlatíðini og tíð var til kaffi og prát, og seinni á Hotel Tórshavn um kvøldið til ein góðan bita.

*-red*

## Andlát og jarðarferðir

**Kristian Joensen**, vanliga nevndur Kidda uppi á Lakju, Toftir, andaðist mikunáttina á Landssjúkrahúsinum, 88 ára gamal.

Kistan við **Hildigerð Hansen í Garðinum, Klaksvík**, fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hósdagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Betesda fríggjadagin kl. 13:30. Tey, ið vilja minnast Hildigerð kunnu lata Javna eina peningagávu. Konta í peningastovnunum.

**Ása Fríða Magnhild Midjord**, fødd Petersen, ættað úr Svínoy, búsitandi á Tvøroyri, andaðist á Suðuroyar sjúkrahúsi 26. mai, 69 ára gomul.

**Laurensa Nielsen**
Strendur

andaðist á Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi
týsdagin 26. mai, 94 ára gomul.
Kistan fer av Ellis- og Røktarheiminum
fríggjakvøldið kl 19.00.
Jarðarferðin verður leygardagin 30. mai kl 13.00
úr Sjóvar Kirkju

*Vegna tey avvarðandi*
**Niels Jacob T.**

Í staðin fyri blómur og krans kann peningurin latast til Eysturoyar Ellis- og Røktarheim, konta í peningastovnunum.

## Ísraelsfeløgini leggja saman

Tey bæði ísraelsku vinafeløgini, Ísraelsfelagið og Vinir Ísraels, verða nú løgd saman í eitt felag.

Stovnandi aðalfundur av nýggjum felag verður á Hotel Hafnia hóskvøldið 28. mai 2009 kl. 20.

Felagið fær nýtt navn og við meira enn 300 limum verður nýggja felagið mundandi sterkari.

Nýggja felagið hevur sama endamál og byggir á kristiligt grundstøði við áherðslu á bókstavliga tulking av Bíbliuni og virkar fyri at upplýsa um bíbilska grundstøðið undir zionismu og tilverurætti Ísraels sum tjóð og land.



Felagið fer eisini at virka fyri røttum tíðindaflutningi um Ísrael og jødarnar og fer at eggja til bøn fyri Jerúsalem og fólkinum har. Eisini fer felagið, eftir førimuni, at veita fíggjarliga hjálp til Ísraels, og at virka fyri góðum samstarvi millum Føroyar og Ísrael og góðum grannalagi millum londini í Miðeystri. Í framtíðini verður meira at lesa á heimasíðu felagsins: www.shalom.fo

Øll, sum taka undir við endamáli felagsins, kunnu gerast limir; eisini stovnar og virki, og fyrireikararnir vóna at mong koma til stovnandi aðalfundin á Hafnia hóskvøldið, har nýggir limir eisini kunnu tekna seg. Ísrael tørvar vinir nú, sum ongantíð áður, verður sagt í tíðindaskrivi frá feløgunum.

## Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll, sum við gávum, brøvum, telefonsamtalum og á annan hátt gjørdu mær 80 ára føðingardagin 13. mai so hugnaligan.

**Kærar heilsanir**
**Hilda Peters, England**

**Dagurin**
**28. mai. Vilhjálmur**, deyður í 812. Hertogi í Gascogne í Fraklandi. Var ein av kempunum hjá Karlamagnusi keisara. Tað er um hann, at Sjóvarbóndin yrkti kvæðið Viljorm Kornus. Hann fór í kleystrið inn at bøta sínar syndir. Seinni legði hann út aftur í herstríð, men halgisøgan sigur, at hann á gamalsaldri aftur fór í kleystrið, sum hann sjálvur hevði grundað. Upprunaliga týskt navn, sum merkir vilji og hjálmur.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*